## Starvsfólkini fáa umboð í nevndina á Dimmu

Nógvar gitingar hava verið seinastu tíðina av bæði einum og øðrum slagi, nú Dimmalætting hevur boðað frá eykaaðalfundi tann 16. januar, men sambært Lisbet L. Petersen, nevndarforkvinnu, so er ikki tað stóra sum hesin eykaaðalfundurin skal koma saman um, skrivar Vágaportalurin.- Men ein broyting verður so, og tað er, at nú fara starvsfólkini at fáa eitt umboð í nevndina soleiðis at fimm fólk verða í nevndini, sigur Lisbeth L. Petersen, nevndarforkvinna í P/F Dimmalætting við Vágaportalin. Spurd um nevndin er nøgd við leiðsluna á blaðnum, sigur Lisbeth L. Petersen við Vágaportalin, at nevndin hevur onga grund annað enn at vera nøgd við leiðsluna. - Alt tað sum gjørt er, er við fullum uppbakningi frá nevndini, sigur nevndarforkvinnan.

# Eg havi skorið mannin á háls

**Mitt á nátt máttu løgregla og sjúkrabilur við fullari ferð til eini hús í Klaksvík, tí ein kona hevði ringt á alarmsentralin og boðað frá, at hon hevði skorið mannin á háls. Men manninum feilti hvørki eitt ella annað**

FØLSK FRÁBOÐAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað verður ikki góðtikið, at fólk ringja á alarmsentralin uttan orsøk og hevði talan ikki verið um serligar umstøður, hevði hetta í morgun kostað eini konu 14 dagar í geglinum*

- Eg vildi bara hjálpa manninum.

Tað var forkláringin upp á, hví ein kona brádliga ringdi á alarmsentralin mitt um náttina við so álvarsligum boðum, at bæði løgregla og portørar sleptu øllum teir stóðu við í hondinum og bráskundaðu sær heim til konuna.

Hon fortaldi rætt og slætt alarmsentralinum, at hon hevði skorið mannin á háls og tí varð alt apparatið sett í verk fyri at bjarga lívi.

Men tá ið løgregla og sjúkrabilur komu á staðið, feilti manninum hvørki eitt ella annað.

Men eitt sindur av speiðsemi var eisini pláss fyri, tí konan endaði við at siga, at endin av øllum var, at maðurin fekk onga hjálp, tí løgreglan fór avstað aftur og maðurin varð verandi eftir.....

Men nú er konan so ákærd fyri at falska fráboðan og fyri ógrundað at hava biðið um hjálp.

### Var kedd

Konan viðgekk í rættinum í morgun, at hon hevði gjørt nakað skeivt og hon var kedd um tað, hon hevði gjørt.

Men hon vildi bara hjálpa manninum.

Tey bæði høvdu drukkið hesa náttina men so fall maðurin á gólv og fekst ikki á føtur aftur.

Tí ringdi hon á alarmsentralin fyri at fáa hjálp til mannin. Men fyri at vissa sær, at løgreglan kom á staðið og hjálpti manninum, segði hon ongantíð, sum var. Ístaðin boðaði hon frá, at hon hevði skorið mannin á háls.

Hon nevndi ongantíð, at talan bara var um, at hann bara lá á gólvinum. Tvørtur ímóti endurtók hon fleiri ferðir, at maðurin varð skorin á háls.

Beint eftir, at hon hevði ringt á alarmsentralin, ringdi vakthavandi á løgreglustøðini aftur til konuna fyri at fáa eitt yvirlit yvir støðuna og tá spurdi hann um hann kundi sleppa at tosa við mannin.

Konan svaraði, at tað bar ikki til, tí hann bløddi.

- Hví bløðir hann, spurdi vakthavandi.

- Tí eg havi skorið hann á háls, endurtók konan einaferð afturat.

Vaktahavandi spurdi eisini, hví hon segði, at hon hevði skorið hann á háls.

- Tí eg havi skorið hann á háls, segði hon einaferð afturat.

Tá ið løgreglan kom á staðið var konan etandi skít og maðurin hevði góða kenning.

Tilsamans varði samrøðan ímillum konuna og alarmsentralin 1 minutt og seks sekund.

### Slapp bíliga

Men slík freamferð verður ikki góðtikin og tí er konan nú drigin fyri rættin.

Ákærin vildi hava hana dømda at sita í 14 dagar, so mikið álvarsliga varð málið mett.

Men dómarin helt at av tí at málið var meiri enn ársgamalt og av tí at konan ongantíð áður er revsað, helt hann at hon kundi sleppa undan at sita.

Tí er konan dømd 14 dagar hefti, sum er treytað í eitt ár. Tað merkir, at ger hon onki ólógligt hetta næsta árið, dettur revsingin burtur.

# Svínaði unga gentu til á internetinum

**Ein maður skal nú í Føroya Rætt fyri at hava lagt seksuellar myndir av eini ungari gentu út á internetið saman við særandi teksti**

INTERNET-BROTSVERK

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fyri fyrstu ferð skal Føroya Rættur nú viðgera eitt mál, har ein maður í Havn er skuldsettur fyri at hava ærumeidd eina unga gentu við ógvuliga særandi myndum á internetinum*

Hvussu hørð skal revsingin vera fyri at svína eina unga gentu til á internetinum.

Tað skal Føroya Rættur taka støðu til í næstu framtíð.

Ein maður úr Havn er skuldsettur fyri at hava lagt niðrandi myndir og myndir av seksuellum slagi av eini ungari gentu, sum hann kendi, út á almennu internetsíðuna www.scor.dk, har tær lógu í eitt heilt ár.

Talan var tilsamans um 17 myndir og afturvið myndini hevði hann lagt rættiliga ágangandi og seksuellan tekst um gentuna á internetið um at hon leitaði eftir fólki at hava seksuelt samband við.

Og hon var ahugað í øllum slagi av seksuellum sambandi, bæði við monnum, kvinnum og pørum.

Sjálv varnaðist gentan ikki myndirnar fyrrenn eitt ár var farið og hon fór at fáa reaktiónir upp á myndirnar.

Talan var um privatar myndir hjá henni og dronginum, sum maðurin, ið var vinmaður drongin, hevði fingið sær fatur á og hevði lagt á internetið.

Maðurin er ikki avhoyrdir í rættinum enn og tí er óvist, hví hann fór so drastiskt og ódámligt til verka, at hann legði myndirnar á interneti, saman við saftigum teksti um seksuelt samband.

Gentan følir eg illa ærumeidda og hevur kravt, at maðurin verður revsaður og samstundis krevur hon endurgjald.

Málið kundi ikki viðgerast liðugt í dag, tí maðurin hevði nústani í morgun fingið sær verja, sum vildi hava stundir at seta seg inn í málið.

Men verjin upplýsti annars, at maðurin játtaði tey faktisku viðurskiftini í málinum. Men um hann annars játtar seg sekan í skuldsetingunum er óvist.

Hetta er fyrsta mál av hesum slagi í Føroyum, men grundað á líknandi dómar, sum eru sagdir í Danmark, fer ákærin at krevja mannin í fongsul í 14-20 dagar.